# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Framkomin Kawasaki við ABS

**Kawasaki í Japan eru komnir á marknaðin við einari heilt nýggjari motorsúkklu. Talan er um Versys við ABS bremsum. Kawasaki vænta sær nógv av hesi tekniskt framkomnu motorsúkklu**




*Kawasaki Versys 650 við ABS-bremsum*

MC
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Japanska Kawasaki verksmiðjan hevur eitt stórt program við nógvum ymiskum motorsúkklum. Nýggjasta súkklan á marknaðinum er Versys við m.a. ABS-bremsum. Súkklan fæst eisini uttan ABS, men tær 7.000 krónurnar, sum ABS bremsurnar kosta eyka, eru absolutt ein góð íløga, tá hugsað verður um trygdina.

Málsetningurin við Kawasaki Versys var at gera eina tekniskt framkomna motorsúkklu við trygdini í hásæti, tí fæst hon m.a. við ABS-bremsum. Fyrimunurin við ABS-systeminum er, at bremsurnar ikki læsast (blokera) undir eini uppbremsing, soleiðis at eingin trupulleiki er at koyra uttan um óvæntaðar forðingar á koyribreytini.

Súkklan tekur seg væl út og er góð at sita á og koyra. Koyriegineikarnir eru heilt í topp, eisini við ferð í svingum. Instrumentini eru løtt at avlesa undir koyring.

Motorurin er ein 2 syl. 649 ccm og 64 hk við 8.000 snún/min. Súkklan koyrir frá 0-100 km/t upp á 4,3 sek og toppferðin er 190 km/t. Girskiftið og koblingin eru sera løtt at handfara, eisini undir uppspiting.

FDM hava royndarkoyrt Kawasaki Versys, og siga teir m.a. “Versys er en inspirerende køremaskine for dem der elsker at køre motorcykel”.

Kawasaki Versys kostar kr. 91.995,- (við ABS) og kr. 84995,- (uttan ABS). Á heimasíðuni hjá MC-Søluni: www.mc-solan.fo eru upplýsingar um úrvalið av t.d. motorsúkklum og skutarum og hópin av leikjum til aðrar MC-síður.

## FAKTA

Kawasaki Versys 650 v.ABS

| | |
|---|---|
| Motorurin | 2-syl. 8 ventilar 649 ccm / 64 hk |
| 0-100 km/t | 4,3 sek |
| Snúningsmoment | 61 Nm við 6.800 snún/min |
| Toppferð | 190 km/t |
| Dekkstødd aftan: | framman: 120/60R-17 160/60R-17 |
| Seturhædd | 84,0 cm |
| Eginvekt | 181 kg |
| Prísur | kr. 91.995,- við ABS |
| **Søluumboð:** | MC-Sølan Skemmingsgøta 23 FO-100 Tórshavn Tel. 315674 / 216300 www.mc-solan.fo |

# Mazda best í Týsklandi




Japonsk bilmerki standa seg væl í týskum kvalitetstestum. Triðja árið á rað hava Mazda vunnið heiðursplássið sum tað mest álítandi bilmerki í kvalitetstestunum hjá Auto Bild, sum er størsta bilblað í Týsklandi. Kappingarneytarnir vóru Toyota og Honda, sum vunnu ávikavist annað og triðja pláss.

Auto Bild ger á hvørjum ári kanningar av kvalitetinum á 24 av teimum mest seldu bilmerkjunum í Týskland og vurdera tey ymisku bilmerkini eftir hvussu álítandi tey eru, slitstyrki, garanti, service og hvussu nøgdir eigararnir eru við sínar bilar.

Eisini gera Auto Bild langtíðartestir við at koyra 100.000 km við teimum ymisku bilunum. Tann einstaki bilurin sum higartil hevur klárað seg best í 100.000 km testini er Mazda6, sum ongan feil hevði.

**mg**

# Ford heiðrað fyri umhvørvið

**Ford hava fingið »EUBIA 2007« heiðurslønina fyri Focus Flexifuel, sum er ein slóðbrótandi bioethanol bilur**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

EUBIA (Europæiske Biomasse Industri Forening) hava givið Ford »EUBIA 2007« heiðurslønina sum viðurkenning fyri teirra bioethanol drivnu bilar.

Hetta hendi á tí fimtandu bioevnisráðstevnuni í Berlin, har umleið 1.400 serfrøðingar úr meira enn 80 londum í eina viku kjakaðust um hvørjar avbjóðingarnar fara at verða í framtíðini viðvíkjandi orku og umhvørvi, og komu teir harvið nógv inn á bioorku.




*Ford Focus Flexifuel hevur fingið »EUBIA 2007« heiðurslønina sum er ein slóðbrótandi bioethanol bilur*

Ford hava selt Focus Flexifuel við 1.8 litra motori síðan 2001 í Svøríki, eins og teir eisini eru byrjaðir í øðrum londum. Focus Flexifuel koyrir upp á E85, sum tað verður nevnt - ein blanding við 85 prosentum av ethanol og 15 prosentum av bensini. Dálkingin úr útstoytunum á hesum bilum er upp til 70 prosent minni enn á vanligum Ford Focus, sum einans koyra við bensini.

Í Svøríki eru umleið 80 prosent av øllum Ford Focus í Flexifuel útgávuni.